Fylgiskjal 12

Fra: bardur@redcross.fo <bardur@redcross.fo>
Sendt: 15. januar 2021 15:30
Til: Andras Marr Poulsen <Andras.Poulsen@fisk.fo>
Cc: 'Sigrið (Reyði Krossur Føroya)' <sigridz@redcross.fo>
Emne: Hoyringsskriv frá Reyða Krossi til "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving"

Hey Andras,

Reyði Krossur hevur fylgjandi viðmerking til "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving":

Í sambandi við at broytingar verða gjørdar í tilbúgvingini, ynskir Reyði Krossur eftir tørvi at taka upp samstarv við viðkomandi partar, eitt nú kommunur, felagsskapir ella landsmyndugleikar.

Eitt nú ber til at gera avtalu um íverksetan av Hjálparnetverkinum, ið kann skipast upp á stutt skotsbrá, har ið eitt nú spontant sjálvboðin, sjálvboðin við útbúgving, ella starvsfólk, kunnu veita ávísan stuðul ella hjálp kring alt landið. Hetta kann vera bæði bundnar og óbundnar tænastur, útgerð o.a..

Hjálparnetverkið hevur telefonnummarið 1818, og kann tí eisini bjóðast út sum ein sokallað "hotline", til eitt nú at stuðla viðkvomum persónum, ella til at veita ávísa kunning, bæði alment og privat.

Harumframt hevur Reyði Krossur eitt viðkomandi samstarv við landsfeløg í grannalondum okkara, og í Arktis, sum kann gagnnýtast, bæði í sambandi við stórskaðatilburðir ella til at menna viðkomandi førleikar ella tænastur ella til útgerð.

Vinarliga
Bárður Atlason Ísheim
Dagligur leiðari

Reyði Krossur Føroya
Stiðjagøta 6
Postboks 1015
FO-100 Tórshavn
redcross@redcross.fo
Tlf. +298 509705